# ÁLIT FRÁ "KOLTURSNEVNDINI"

Nevnd sett av Føroya Landsstýri 10. mars 1989
at koma við uppskoti um eina antikvariska serskipan fyri Koltur.

Hoyvík 1990

## INNGANGUR

Í skrivi dagfest 10. mars 1989 (skjal 1) setti Føroya Landsstýri "eina skjóttarbeiðandi nevnd at koma við uppskoti um eina antikvariska serskipan fyri Koltur, sum kemur at fevna um hús og bygningar og eisini um bø og annað mannaverk innan- sum uttangarðs".

Í hesa nevnd vórðu settir:

**Jóan Pauli Joensen**, valdur av Føroya Fornminnissavni, formaður,
**Sjúrður Joensen**, valdur av Hest kommunu,
**Jóannes Dalsgarð**, valdur av Føroya Jarðarráði,
**Mortan Winther Poulsen**, valdur av Føroya Forngripafelagi,
**Jens John Østerø**, valdur av Føroya Landsstýri.

Við á einum ella fleiri fundunum hava eisini verið Símun V. Arge, settur landsantikvarur, Andras Mortensen, savnvørður, Jóhanes Jóhansen, savnsleiðari, Ólavur Clementsen, landmálari og Jóan Jacob Joensen, fyrrv. kongsbóndi, Koltri.

## BAKSTØÐI

Gongdin í málinum er í stuttum, at Føroya Forngripafelag í skrivi dagfest 11. juni 1987 (skjal 2) heitti á Føroya Landsstýri "um at

seta eina skjóttarbeiðandi nevnd, sum í samráð við tey, ið har búgva, skal koma við uppskoti um, hvussu farast skal fram". Skrivið hevur verðið sent Føroya Fornminnissavni til ummælis, sum tók undir við áheitanini í tilmæli sínum (skjal 3), har tað m.a. verður sagt, at "Tað mátti borið til at skipa alla oynna sum eitt bygdasavn og tillaga framburðin á oynni eftir hesum. Tað mátti eisini borið til at latið bóndanum eitt endurgjald fyri ta møguligu inntøku, hann missir við ikki at nútímansgera garðsdriftina. Hann kundi eisini beinleiðis verðið løntur fyri luttøku í antikvariska virkseminum". Í álitunum skjýtir Fornminnissavnið upp at seta eina nevnd, ið umboðar ávís áhugamál. Hesi áheitan hevur Landsstýrið í høvuðsheitunum fylgt.

Føroya Náttúrugripasavn hevur eisini sýnt Koltri stóran áhuga. Í skrivi dagfest 20. 12. 1988 (skjal 4) hevur Náttúrugripasavnið heitt á Føroya Jarðarráð um at friða oynna, avtaka seyðin og gera Koltur til eitt vísindaligt øki. Náttúrugripasavnið hevur í sambandi við hetta boðað formanninum í "Koltursnevndini" til fundar 28. februar 1989, har hann varð kunnaður um hetta mál.

Áhugin hjá Náttúrugripasavninum er tí frá byrjan tvinnaður upp í arbeiði hjá Koltursnevndini, sum í skrivi sínum frá 20.12.1988 sigur, at "Tað vildi verið náturligt, um eisini Náttúrugripasavnið var við í einum tílíkum arbeiði". "Koltursnevndin" hevur tí eisini tikið áhugan hjá Náttúrugripasavninum upp í viðgerð sína. Í hesum sambandi eigur at verða upplýst, at náttúruvísindaligar kann-

ingar eru longu byrjaðar í samstarvi við svenskar lívfrøðingar. Náttúrugripasavnið hugsar sær Koltur sum eina "feltbiologiska statión". Nordisk Embedsmandskommite for Miljøspørgsmål er eisini kunnað um henda spurning.

Á nevndarfundi 4. apríl 1989 varð upplýst, at eingin formliga enn hevur tikið við sum bóndi í Koltri, síðani Jóan Jakku Joensen segði festið frá sær. Brøðurnir Jóan Pauli Joensen og Sjúrður Joensen hava sýnt áhuga fyri festinum, men enn er eingin endalig avgerð tikin í hesum máli. Grund er eisini til at halda, at hesin spurningurin heldur ikki verður avgreiddur av Jarðarráðnum, fyrr enn "Koltursnevndin" hevur lagt álit sítt fram.

Í brævinum frá Føroya Forngripafelag, sum nevnt er omanfyri, verður sagt, at arbeiðið skal gerast í samráð við tey, sum búgva í Koltri, ið sjálvandi eisini hava síni áhugamál at røkja. Hesi sjónarmið hevur nevndin eisini roynt at tikið við í arbeiði sínum.

**ÁVEGIS TIL EITT UPPSKOT**

12. juli 1989 var nevndin úti í Koltri og kunnaði seg við viðurskiftini og byrjaði saman við fólki frá Fornminnissavninum eitt antikvariskt skrásetingararbeiði av bø og bygningum, sum sæst í hjáløgdu frágreiðing (skjal 5). Fleiri av upprunaligu gomlu sethúsunum eru illa farin og verða nú nýtt til onnur endamál, men sethúsini, sum Jóan Jakku Joensen hevur búð í, og tey, sum Jóan Pauli Joensen nú býr í, eru í góðum standi. Fleri úthús eru meira ella minni avfallin,

men Sjúrður Joensen hevur sera hegnisliga bygt okkurt av teimum uppaftur.

Danski fólkalívsfrøðingurin Holger Rasmussen stóð í 1949 fyri einum rættiliga stórum kanningararbeiði í Koltri. Uppmátingar, uppskriftir, myndir o.a. eru til skjals á Nationalmuseets 3. Afdeling, Dansk Folkemuseum. Okkurt av hesum er eisini á Føroya Fornminnissavni. Eitt beinleiðis úrslit er eisini greinin hjá Holger Rasmussen "Koltur. En færøsk bygd. Í Fra Nationalmuseets Arbejdsmark, København 1951" (skjal 6).

Hetta kanningararbeiðið, ið Holger Rasmussen stóð fyri, fevndi so at siga bert um býlingin heima í Húsi, meðan mestsum einki var gjørt burtur úr býlinginum norðuri í Gerði og gróthúsunum á Gróthústanga. Ætlanin er, at Ólavur Clementsen skal skipa fyri uppmáting av býlinginum norðuri í Gerði og av Gróthústanga, so skjótt sum tað liggur fyri hjá honum. Kostnaðin av hesum arbeiði ber landsstýrið sbrt. skriv dagfest 27. juni 1989 (skjal 7).

Nevndin hevur ikki skilt setning sín so, at hon skal gera beinleiðis antikvariskt arbeiði, so sum uppmáting og raðfesting av umvæling og ístandsetingum, men at hon eigur at koma við eini loysn, sum ger slíkt møguligt innan eina serskipan. Í hesum sambandi skal verða nevnt, at í býlinginum heima í Húsi samtykti Føroya Landsstýri 15. december 1955 "at friða bóndahúsini við úthúsum í Koltri við undirliggjandi grundstykki, sum hoyra til festið hjá Ragnar Thomsen, Koltur". Henda friðing varð ting-

lisin 17. januar 1956 (skjal 8).

**TILMÆLI NEVNDARINNAR**

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta, sum hvør hevur sítt tilmæli.

Hoyvík, tann 20. februar 1990.

Jóan Pauli Joensen
formaður

Tilmæli minnilutans í Koltursnevndini:

**Minnilutin,** Sjúrður Joensen, tekur undir við at tað verður gjørd ein antikvarisk skipan fyri Koltur, soleiðis at partar av oynni s.t.d. teigalendini og ávísir bygningar verða friðaðir. Koltur eigur framhaldandi at vera fest av bónda, sum livur av landbúnað og tí, sum oyggin annars gevur. Minnilutin kann sostatt ikki taka undir við, at serlig tiltøk verða sett í verk í sambandi við náttúrufriðingina, so sum at seyður og neyt verða tikin av oynni.

Hoyvík, tann 20. februar 1990

Sjúrður P. Joensen

Tilmæli meirilutans í Koltursnevndini.

**Meirilutin**, Mortan Winther Poulsen, Jens John Østerø, Jóannes Dalsgarð og Jóan Pauli Joensen heldur, at besta loysn er, at Koltur í síni heild verður friðað oyggj, stýrd eftir serligari fyriskipan, og setir fram uppskot um serskipan fyri Koltur, ið fevnir bæði um eina antikvariska og eina náttúruvísindaliga skipan. Henda skipan eigur sum skjótast at verða sett í verk, soleiðis at farast kann undir antikvariska og náttúruvísindaliga arbeiðið innan tryggan og varandi karm. Meirilutin setir fram hetta ítøkiliga

UPPSKOT:
Skotið verður upp, at Koltur fyribils ikki verður fest, men at oyggin verður latin einum serligum sjálveigandi Koltursstovni at umsita. Hesin stovnur skal kunna seta umsjónarmann í Koltri við fastari løn. Umsjónarmaðurin skal hava dagliga eftirlitið við oynni og tí, sum har er.

Nevndin skjýtir upp hesa orðing til serskipan fyri Koltur:

Uppskot til serskipan fyri Koltur

§ 1

Koltur verður í síni heild skipað sum ein friðað oyggj, stýrd eftir hesi fyriskipan.

STÝRISSKIPAN

§ 2

Koltur verður latið einum sjálveigandi

stovni, **Koltursstovninum,** ið fær nýtslurættin og dagligu ábyrgdina av Koltri.

§ 3

Í stýrinum fyri Koltursstovninum sita eitt umboð fyri Føroya Fornminnissavn, eitt umboð fyri Føroya Nátturugripasavn, eitt umboð fyri Fróðskaparsetur Føroya, eitt umboð fyri Føroya Jarðarráð, eitt umboð fyri Hests kommunu og eitt umboð fyri Føroya Forngripafelag. Umboðini verða vald fyri 3 ár í senn. Stýrið velur sjálvt formannin, sum hevur avgerandi orðið, tá tað stendur á jøvnum.

2. stk. Stýrið hevur rætt til at seta løntan umsjónarmann í Koltri.

§ 4

Koltursstovnurin kann sum sjálveigandi stovnur eisini søkja pening aðrastaðini enn úr landskassanum.

§ 5

Koltursstovninum er heimilað at innrætta bústað og arbeiðshøli til vísindalig ella listarlig endamál í teimum húsum, sum eru á oynni, og loyva fólki at vistast har í stytri ella longri tíðarskeið, kortini so, at hetta ikki nervar friðingarmálið.

ANTIKVARISK SKIPAN

§ 6

Bygningar og annað mannaverk í Koltri, ið kann góðtakast sum fornminni, verður friðað sambært løgtingslóg um friðing av fornminnum og bygningum. Í samstarvi við Koltursstovnin ger Føroya Fornminnissavn uppskot um friðingartreytirnar.

§ 7

Føroya Fornminnissavn hevur eftirlit við antikvarisku friðingini.

NÁTTÚRUVÍSINDALIG SKIPAN.

§ 8

Friðingartiltøk verða sett í verk í Koltri sambært løgtingslóg um natúrufriðing. Í samstarvi við Koltursstovnin ger Føroya Náttúrugripasavn uppskot um friðingartreytirnar.

§ 9

Føroya Nátturugripasavn hevur eftirlit við nátúrfriðingini í Koltri.

GILDISFYRISKIPAN

§ 10

Henda fyriskipan kemur í gildi, so skjótt sum hon er lýst, og umboðini í Koltursstovnin eru vald.

Hoyvík 20. februar 1990

Mortan Winther Poulsen

Jóannes Dalsgarð

Jens John Østerø

Jóan Pauli Joensen